# Tá Føroyar eru vakrast…

**Leygarkvøldið var rættiligt ódnarveður, so neyðugt varð at avlýsa øll tiltøk á Summar Festivalinum. Longu mánakvøldið - tvey samdøgur seinni – vóru Føroyar so vakrar, sum bara Føroyar kunnu vera**

VEÐURLAG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Einaferð skrivaði Rói Patursson í einum inngangi til eitt ferðavinnurit, at Føroyar eru so vakrar, at tú sjáldan sær, hvussu vakrar tær í veruleikanum eru - ella kunnu verða, tá tær eru vakrast.

Orðini hjá Róa vóru ikki orðarætt hesi, men okkurt slíkt lá aftanfyri tað, hann vildi siga.

Eina slíka mynd, sum rithøvundurin sipaði til, kundu fólk síggja seint mánakvøldið, tá sólin reið beint undir fjallatoppunum vestanfyri og sendi sínar seinastu ljósglæmur hetta kvøldið upp um hægstu tindar.

Myndin er tikin av Toftum og vestur yvir Strandalandið og vestur yvir Kollafjørð og fjøllini um hesar leiðir.

Jú, sanniliga eru Føroyar vakrar - og kanska vakrari, enn mong geva sær far um í tí dagliga.

Leygarkvøldið var ódnarveður í Klaksvík, so neyðugt varð at avlýsa øll tiltøkini á Summar Festivalinum.

Mánakvøldið - bert tvey samdøgur seinni – vóru Føroyar so vakrar, sum bara Føroyar kunnu vera…



*Sólin er farin undir fjallatopparnar vestanfyri og sendir sínar seinastu ljósgeislar upp um hægstu tindar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin og hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 16 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

**Miðal hitin í juli bleiv 10,6 stig, móti 10,3 sum er meðal í 30 ár. Avfallið bleiv 73 mm móti 83,4 mm**

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 27 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 30 |
| Madrid | 36 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 27 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 16 |
| New York | 26 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 7 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. í landsynning sunnan úr Føroyum fer spakuliga í landnyrðing og grynnist. Eitt hátrýst, 1031 hPa. norðan fyri Azorurnar viknar, men ein hátrýstryggur til Íslands verður yvir Føroyum mikudagin.




**Í dag:**
Hátrýstryggurin yvir Føroyum stendur mestsum í stað og gevur góðveður á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 5/8 kl. 06[00] – 6/8. 06[00]. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 5/8 kl. 06[00] – 6/8 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 26,0 mm

**Atgongumerki til Miðlahúsið á ólavsøku**

Vinnararnir eru drignir.

Ferð við Atlantsflog til Íslands nr. 58

Ferð við Atlantsflog til Íslands nr. 150

Gisting á Hotel Tórshavn eina nátt og døgurði fyri tvey nr. 222

Skemtbøkurnar hjá Óla P nr. 17

Sigið frá á telefon 341800, navn, adressa og telefon.

Sosialurin/Miðlahúsið

**Ólavsøkublað fæst í Miðlahúsinum**

**Vit hava framvegis liggjandi trivaliga og vælumtókta ólavsøkublaðið. Koma tit framvið í Tórsgøtu 1 fáa tit blaðið.**

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 4. august | Mánin næstur jørðini |
| 5. august | Seinna kvarter |
| 13. august | Tendring |
| 19. august | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. aug | 02.22 | 14.50 | 01.22 | 13.50 | 01.37 | 14.05 | 04.22 | 16.50 | 05.22 | 17.50 | 00.37 | 13.05 |
| 8. aug | 03.20 | 15.50 | 02.20 | 14.50 | 02.35 | 15.05 | 05.20 | 17.50 | 06.20 | 18.50 | 01.35 | 14.05 |
| 9. aug | 04.19 | 16.48 | 03.19 | 15.48 | 03.34 | 16.03 | 06.19 | 18.48 | 07.19 | 19.48 | 02.34 | 15.03 |
| 10. aug | 05.16 | 17.44 | 04.16 | 16.44 | 04.31 | 16.59 | 07.16 | 19.44 | 08.16 | 20.44 | 03.31 | 15.59 |
| 11. aug | 06.11 | 18.38 | 05.11 | 17.38 | 05.26 | 17.53 | 08.11 | 20.38 | 09.11 | 21.38 | 04.26 | 16.53 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. aug | - | 12.05 | 02.37 | 15.05 | 03.37 | 16.05 | 02.07 | 14.35 | 03.22 | 15.50 |
| 8. aug | 00.35 | 13.05 | 03.35 | 16.05 | 04.35 | 17.05 | 03.05 | 15.35 | 04.20 | 16.50 |
| 9. aug | 01.34 | 14.03 | 04.34 | 17.03 | 05.34 | 18.03 | 04.04 | 16.33 | 05.19 | 17.48 |
| 10. aug | 02.31 | 14.59 | 05.31 | 17.59 | 06.31 | 18.59 | 05.01 | 17.29 | 06.16 | 18.44 |
| 11. aug | 03.26 | 15.53 | 06.26 | 18.53 | 07.26 | 19.53 | 05.56 | 18.23 | 07.11 | 19.38 |